# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

**Tórshavn**, 26. september 2017

**J.Nr.:** 17/00353-2

**Løgtingsmál nr. 26/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Skattalætti til fyritíðarpensjónistar)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

(Skattalætti til fyritíðarpensjónistar)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 122 frá 21. august 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 29, nr. 13, litra a verður orðað soleiðis:
”a) Grundupphædd av fólkapensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 1, grundupphædd av fyritíðarpensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 2-4, avlamisviðbót eftir § 2, stk. 3, eyka viðbót eftir § 2, stk. 4, avlamisveiting eftir § 8 a, barnaviðbót eftir § 10, hjálparviðbót og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 12 og aldursviðbót eftir § 45 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.”

**2.** § 47, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 3.* Munurin millum álíknaða kommunuskattin og tað, hin skattskyldugi skal gjalda sambært stk. 2, verður goldin kommunukassanum av landskassanum soleiðis, at kommunan fær álíknaða kommunuskattin. Er frádrátturin hægri enn samanlagdi lands- og kommuskatturin, verður munurin goldin avvarðandi skattgjaldara mánaðarliga.”

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2018.

Tinganes • Postsmoga 2039 • FO-110 Tórshavn
Telefon: + 298 35 22 00 • Telefax: + 298 35 22 01 • E-mail: FMR@FMR.FO

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið verður lagt fram í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2018.

Talan er um uppskot til broyting í skattalógini, sum eigur at verða viðgjørt saman við uppskoti til broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum, sum landsstýrismaðurin í Almannamálum leggur fram í sama viðfeingi (løgtingsmál nr. 25/2017).

Í hesum uppskotinum verður mælt til, at grundupphæddin av fyritíðarpensjón verður gjørd skattafrí, og at óbrúktur pensjónistafrádráttur kann verða útgoldin. Í broytingaruppskotinum til lóg um áseting og javning av almannaveitingum verður mælt til, at upphæddirnar til somu fyritíðarpensjónistar verða stillaðar soleiðis, at samlaði vøksturin í útgjaldinum – vegna skattafrítøku av grundupphædd og útgjaldi av pensjónistafrádrátti – verður hóskandi.

Uppskotini bæði hanga sostatt saman, og verða bæði uppskotini samtykt, fara tey samanlagt at tryggja teimum, ið fáa fyritíðarpensjón, ein fíggjarligan lætta á 1.000 kr. um mánaðin komandi ár.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*Grundupphædd av fyritíðarpensjón*
Í § 29 í Skattalógini er ásett, hvørjar inntøkur ikki skulu roknast upp í skattskyldugu inntøkuna – tað vil siga, eru púra skattafríar.

Í § 29, nr. 13, litra a er ásett, hvørjar veitingar sambært lóg um almannapensjónir o.a. (Løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a.) eru skattafríar.

Eftir galdandi skattalóg skulu hesar veitingar sambært lóg um almannapensjónir ikki roknast upp í skattskyldugu inntøkuna:

- Avlamisviðbót eftir § 2
- Grundupphædd til fólkapensjón eftir § 2
- Eyka viðbót eftir § 2, stk. 4
- Avlamisveiting eftir § 8 a
- Barnaviðbót eftir § 10
- Hjálpar- og røktarviðbót eftir § 11
- Persónlig viðbót eftir § 12
- Aldursviðbót eftir § 45

Grundupphæddin av fyritíðarpensjónini er ikki nevnd, og skal sostatt roknast upp í skattskyldugu inntøkuna sambært galdandi lóg.

*Pensjónistafrádráttur*
Fyritíðarpensjónistar eru fevndir av einum serligum skattafrádrátti, sum hevur við sær, at fyritíðarpensjónin, longu í dag, í stóran mun er skattafrí.

Hesin frádráttur er ásettur í § 3 í Ásetingarlógini og er galdandi fyri persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini. Frádrátturin kann eisini gevast til persónar 67 ár ella eldri, sum ikki fáa fólkapensjón.

Frádrátturin fyri giftar persónar er 10.500 kr. árliga, og frádrátturin fyri stakar persónar er 16.200 kr. árliga.

Frádrátturin verður drigin frá roknaða landsskattinum. Um frádrátturin ikki rúmast í landsskattinum, verður hesin – við heimild í § 47, stk. 2 í Skattalógini – drigin frá í kommunuskattinum og kirkjuskattinum. Kommunurnar og Fólkakirkjan fáa síðan endurgjald frá landinum fyri frádráttin.

Er ein rest eftir, aftaná at drigið er frá í kommunuskattinum og kirkjuskattinum, fellur restupphæddin burtur. Tað vil siga, at restupphæddin verður sambært galdandi lóg ikki útgoldin.

Skattafrádrátturin hevur onga ávirkan á gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Heilsutrygd, sum fyritíðarpensjónistar eisini rinda.

Frádrátturin hevur við sær, at fyritíðarpensjónistar uttan aðra inntøku framíhjá, ongan landsskatt rinda.

Tey við hægstu fyritíðarpensjón rinda tó umleið 17–19 tús. kr. árliga í kommunuskatti, alt eftir hjúnastøðu og kommunuskattaprosenti. Tey við miðal og lægstu fyritíðarpensjón rinda tó væl minni, umleið 500-2.000 kr. árliga, alt eftir hjúnastøðu og kommunuskattaprosenti og hvørja pensjón talan er um.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at veita teimum, ið fáa fyritíðarpensjón ein fíggjarligan lætta.

Fyritíðarpensjónin hevur ikki verið javnað regluliga í mong ár, og hetta hevur havt við sær, at veitingarnar til fyritíðarpensjónistar eru lækkaðar í virði, sæð í mun til prísstøðið og lønarlagið annars.

Mælt verður til, at grundupphæddin hjá fyritíðarpensjónistum verður gjørd skattafrí, eins og grundupphæddin hjá fólkapensjónistum longu er skattafrí. Eisini verður mælt til, at óbrúktur pensjónistafrádráttur verður útgoldin, eins og t.d. barnafrádráttur í dag verður útgoldin, um ongin skattur er at draga frá í. Harumframt verða skattskyldugu viðbøturnar, sum fyritíðarpensjónistar fáa, stillaðar soleiðis, at vøksturin í útgjaldi verður hóskandi.

Samanlagt hava bæði uppskotini við sær, at øll, sum fáa fyritíðarpensjón, fáa ein lætta á 1000 kr. um mánaðin

Hvussu broytingin fer at ávirka fyritíðarpensjónistar verður víst í talvunum niðanfyri. Sum víst, hækkar mánaðarliga útgjaldið hjá øllum fyritíðarpensjónistum við 1000 kr. um mánaðin.

| **Hægsta fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið sambært galdandi lóg** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 71.928 | 64.944 | 5.994 | 5.412 |
| Avlamisviðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 185.664 | 160.008 | 15.472 | 13.334 |
| **Skattskyldug inntøka** | **144.288** | **122.436** | **12.024** | **10.203** |
| Landsskattur | -11.893 | -8.615 | -991 | -718 |
| Kommunuskattur | -23.189 | -18.755 | -1.932 | -1.563 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -777 | -629 | -65 | -52 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.966 | -2.835 | -247 | -236 |
| Gjald til AMEG | -3.246 | -2.755 | -271 | -230 |
| Kringvarpsgjald | -1800 | -1800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **157.992** | **135.119** | **13.166** | **11.260** |

Stakur persónur við hægstu fyritíðarpensjón – og við miðal komunnuskattaprosentið – fær í dag útgoldið 13.166 kr. um mánaðin. Giftur fær 11.260 kr. Grundupphæddin og viðbótin eru í dag skattskyldug, meðan restin av veitingunum eru skattafríar. Samlaði lands-, kommunu- og kirkjuskatturin er í dag hægri enn skattafrádrátturin, sum er 16.200 kr. árliga fyri støk, og 10.500 kr. árliga fyri gift. Frádrátturin verður sostatt brúktur fult út.

| **Hægsta fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið við broyting** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 49.452 | 51.420 | 4.121 | 4.285 |
| Avlamisviðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 163.188 | 146.484 | 13.599 | 12.207 |
| **Skattskyldug inntøka** | **49.452** | **51.420** | **4.121** | **4.285** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | -3.947 | -4.346 | -329 | -362 |
| Brúktur skattafrádráttur | 4.079 | 4.492 | 340 | 374 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 12.121 | 6.008 | 1.010 | 501 |
| Kirkjuskattur | -132 | -146 | -11 | -12 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.397 | -2.409 | -200 | -201 |
| Gjald til AMEG | -1.113 | -1.157 | -93 | -96 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **170.000** | **147.127** | **14.167** | **12.261** |
| **Hækking** | **12.007** | **12.007** | **1.001** | **1.001** |

Við broytingini verður grundupphæddin skattafrí, og einasta skattskylduga inntøkan verður sostatt viðbótin, sum í sama viðfangi verður lækkað. Lækkingin í skattskyldugu inntøkuni hevur við sær, at staki pensjónisturin einans brúkar 4.079 kr. av samlaða frádráttinum á 16.200

kr. Av hesum verða 3.947 kr. drignar frá í kommunuskattinum og 132 kr. verða drignar frá í kirkjuskattinum. Restina fær hann ikki brúkt, tí ikki meira skattur er at draga frá í. Gifti pensjónisturin brúkar 4.492 kr. av 10.500 kr. Í uppskotinum verður mælt til at tann parturin av frádráttinum, sum penjónisturin ikki brúkar verður útgoldin, nú so lítil skattur verður at draga frá í. Tað vil siga, at gifti pensjónisturin fær útgoldið munin millum 16.200 kr. og 4.079 kr., sum er 12.121 kr., og giftur pensjónistur fær útgoldið munin millum 4.492 kr. og 10.500 kr., sum er 6.008 kr.

Talan verður sostatt um tríggjar broytingar: grundupphæddin verður skattafrí, viðbótin verður lækkað og óbrúktur frádráttur verður útgoldin. Samanlagt hava allar tríggjar broytingarnar við sær, at bæði tann gifti og tann staki pensjónisturin fáa 1001 kr. meira útgoldið um mánaðin.

| **Miðal fyritíðarpensjón**<br>**Útgoldið sambært galdandi lóg** | ***Støk***<br>ár | ***Gift***<br>ár | ***Støk***<br>mð | ***Gift***<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 23.340 | 20.280 | 1.945 | 1.690 |
| Eyka viðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 137.076 | 115.344 | 11.423 | 9.612 |
| **Skattskyldug inntøka** | **95.700** | **77.772** | **7.975** | **6.481** |
| Landsskattur | -4.605 | -1.916 | -384 | -160 |
| Kommunuskattur | -13.331 | -9.693 | -1.111 | -808 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -447 | -325 | -37 | -27 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.674 | -2.567 | -223 | -214 |
| Gjald til AMEG | -2.153 | -1.750 | -179 | -146 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **128.266** | **107.794** | **10.689** | **8.983** |

Stakur persónur við miðal fyritíðarpensjón – og við miðal komunnuskattaprosentið – fær í dag útgoldið 10.689 kr. um mánaðin. Giftur fær 8.983 kr. um mánaðin. Grundupphæddin og viðbótin eru í dag skattskyldug, meðan restin av veitingunum eru skattafríar. Samlaði lands-, kommunu- og kirkjuskatturin er í dag hægri enn skattafrádrátturin á 16.200 kr. fyri støk og 10.500 kr. fyri gift.

Við broytingini verður grundupphæddin skattafrí, og einasta skattskylduga inntøkan verður sostatt viðbótin, sum í sama viðfangi verður lækkað. Lækkingin í skattskyldugu inntøkuni hevur við sær, at hvørki staki ella gifti pensjónisturin brúka frádráttin, tí teir ongan skatt koma at rinda. Allur frádrátturin verður tí útgoldin.

Samanlagt hava allar tríggjar broytingarnar við sær, at bæði tann gifti og tann staki miðal fyritíðarpensjónisturin fáa umleið 1.000 kr. meira útgoldið um mánaðin.

| Miðal fyritíðarpensjón<br>Útgoldið við broyting | *Støk*<br>ár | *Gift*<br>ár | *Støk*<br>mð | *Gift*<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 14.652 | 18.684 | 1.221 | 1.557 |
| Eyka viðbót | 33.768 | 33.768 | 2.814 | 2.814 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 128.388 | 113.748 | 10.699 | 9.479 |
| **Skattskyldug inntøka** | **14.652** | **18.684** | **1.221** | **1.557** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Brúktur skattafrádráttur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.188 | -2.212 | -182 | -184 |
| Gjald til AMEG | -330 | -420 | -27 | -35 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **140.270** | **119.816** | **11.689** | **9.985** |
| **Hækking** | **12.004** | **12.022** | **1.000** | **1.002** |

Stakur persónur við lægstu fyritíðarpensjón – og við miðal komunnuskattaprosentið – fær í dag útgoldið 10.648 kr. um mánaðin. Giftur fær 8.877 kr. um mánaðin. Grundupphæddin og viðbótin eru í dag skattskyldug, meðan restin av veitingunum eru skattafríar. Samlaði lands-, kommunu- og kirkjuskatturin er í dag hægri enn skattafrádrátturin á 16.200 kr. fyri gift og 10.500 kr. fyri gift, og verður sostatt brúktur fult út.

| Lægsta fyritíðarpensjón<br>Útgoldið sambært galdandi lóg | *Støk*<br>ár | *Gift*<br>ár | *Støk*<br>mð | *Gift*<br>mð |
|---|---|---|---|---|
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 22.032 | 17.688 | 1.836 | 1.474 |
| Eyka viðbót | 34.080 | 34.080 | 2.840 | 2.840 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 136.080 | 113.064 | 11.340 | 9.422 |
| **Skattskyldug inntøka** | **94.392** | **75.180** | **7.866** | **6.265** |
| Landsskattur | -4.409 | -1.527 | -367 | -127 |
| Kommunuskattur | -13.065 | -9.167 | -1.089 | -764 |
| Skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | -438 | -307 | -36 | -26 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.666 | -2.551 | -222 | -213 |
| Gjald til AMEG | -2.124 | -1.692 | -177 | -141 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **127.778** | **106.520** | **10.648** | **8.877** |

Við broytingini verður grundupphæddin skattafrí, og einasta skattskylduga inntøkan verður sostatt viðbótin, sum í sama viðfangi verður lækkað. Lækkingin í skattskyldugu inntøkuni hevur við sær, at hvørki staki ella gifti pensjónisturin brúka frádráttin, tí teir ongan skatt koma at rinda. Allur frádrátturin verður tí útgoldin.

Samanlagt hava allar tríggjar broytingarnar við sær, at bæði tann gifti og tann staki við lægstu fyritíðarpensjónisturin fáa góðar 1.000 kr. meira útgoldið um mánaðin.

| **Lægsta fyritíðarpensjón** | ***Støk*** | ***Gift*** | ***Støk*** | ***Gift*** |
|---|---|---|---|---|
| **Útgoldið við broyting** | ár | ár | mð | mð |
| Grundupphædd | 72.360 | 57.492 | 6.030 | 4.791 |
| Viðbót | 13.860 | 17.064 | 1.155 | 1.422 |
| Eyka viðbót | 34.080 | 34.080 | 2.840 | 2.840 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 7.608 | 3.804 | 634 | 317 |
| Veitingar íalt | 127.908 | 112.440 | 10.659 | 9.370 |
| **Skattskyldug inntøka** | **13.860** | **17.064** | **1.155** | **1.422** |
| Landsskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kommunuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Brúktur skattafrádráttur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Útgoldin skattafrádráttur | 16.200 | 10.500 | 1.350 | 875 |
| Kirkjuskattur | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Gjald til Heilsutrygd | -2.183 | -2.202 | -182 | -184 |
| Gjald til AMEG | -312 | -384 | -26 | -32 |
| Kringvarpsgjald | -1.800 | -1.800 | -150 | -150 |
| **Útgoldið** | **139.813** | **118.554** | **11.651** | **9.879** |
| **Hækking** | **12.035** | **12.034** | **1.003** | **1.003** |

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samanumtikið hevur uppskotið við sær, at grundupphæddin av fyritíðarpensjón ikki longur verður skattskyldug, og at óbrúktur pensjónistafrádráttur verður útgoldin, í teimum førum, har ongin skattur er at draga frá í.

Sum nevnt omanfyri, verða veitingarnar til tey við hægstu og miðal fyritíðarpensjón í sama viðfeingi rættaðar til soleiðis, at samlaða hækkingin í útgjaldinum verður hóskandi.

Henda rætting verður, sum áður nevnt, gjørd í broytingaruppskotið til lóg um áseting og javning av almannaveitingum (løgtingsmál nr. 25/2017).

Samanlagt hava bæði uppskotini við sær, at tey, ið fáa fyritíðarpensjón, fáa ein lætta á 1000 kr. um mánaðin í 2018.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umframt at verða lagt fram til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya Landsstýri verður uppskotið sent beinleiðis til niðanfyri nevndu hoyringspartar:

- Almannaverkið
- Kommunufelagið
- Landsfelag Pensjónista
- MBF

Uppskotið varð ikki sent í hoyring fyrr enn eftir framløgu. Ongi hoyringssvar ella ummælisskjøl eru tí hjáløgd.

Hoyringssvar verða send Løgtinginum eftir, at hoyringsfreistin er úti, tann 9. oktober 2017.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar bæði fyri landið og kommunurnar.

Avleiðingarnar av uppskotinum mugu síggjast í samanhangi við áðurnevnda uppskot til broyting í lóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Roknað verður við, at bæði uppskotini samanlagt fara at hava við sær eina meirinntøku fyri landið á góðar 9,4 mió. kr. árliga. Landið sparir umleið 21,9 mió. kr. av, at veitingar verða broyttar, men missir 12,5 mió. kr. í landsskatti av, at veitingar verða skattafríar, og frádráttur verður útgoldin.

Fyri kommunurnar koma bæði uppskotini samanlagt at hava við sær minni skattainntøkur á umleið 25,3 mió. kr. árliga.

Eisini inntøkurnar hjá Fólkakirkjuni, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Heilsutrygd lækkað vegna broytingarnar. Roknað verður við, at kirkjuskatturin lækkar við 800 tús. kr., gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin hækkar við 3,0 mió. kr., og at gjaldið til Heilsutrygd lækkar við 800 tús. kr.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið, men ikki fyri kommunurnar.

Tað er ein fortreyt fyri uppskotinum, at tað tøkniliga ber til at rinda óbrúktan frádrátt út mánaðarliga. Men enn ber ikki til at siga við vissu, hvørjar tøkniligar broytingar skulu gerast í hesum sambandi.

TAKS hevur í dag skipanir, sum gera eina endaliga skattauppgerð við árslok. Eftir tað kann ov nógv uppkravdur skattur, ella t.d. óbrúktur barnafrádráttur, verða útgoldin skattgjaldaranum. TAKS hevur í dag ikki skipanir, sum kunnu útgjalda ov nógvan skatt/frádrátt leypandi hvønn mánað. Neyðugt er tí at menna eina nýggja skipan. TAKS upplýsir, at tað ikki er møguligt við stuttum skotbrá at gera eina meting av kostnaðinum av nýggjari útgjaldsskipan, men nakrar 100.000 kr. kann ein tílík skipan koma at kosta.

Roknað verður við tí við eyka útreiðslum hjá TAKS, um frádrátturin – sum ætlað – skal útgjaldast mánaðarliga.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri tey, sum fáa fyritíðarpensjón. Samanlagt hava bæði uppskotini við sær, at tey, ið fáa fyritíðarpensjón, fáa ein lætta á 1.000 kr. um mánaðin.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær beinleiðis marknaforðingar. Men tað, at størri partur av veitingunum gerst skattafrí kann virka sum ein óbeinleiðis marknaðarforðing í teimum førum, tá fyritíðarpensjónistur flytur úr Føroyum til Danmarkar og tekur pensjónina við sær.

Vanliga verða sosialar trygdarveitingar skattaðar í keldulandinum, t.v.s. landinum, sum veitingin kemur frá. Hetta er eisini meginreglan í norðurlendska sáttmálanum, og reglan í øðrum sáttmálum, ið Føroyar eru partur av.

Tá tað kemur til viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, so hevur bústaðarlandið eftir protokol millum Føroyar og Danmark rættin at skatta. Fyritíðarpensjónistar, sum flyta úr

Føroyum til Danmarkar, kunnu taka pensjónina við til Danmarkar í upp til trý ár. Pensjónin, ið verður goldin úr Føroyum, verður sostatt skattað í Danmark eftir donskum reglum.

At veitingarnar í stóran mun eru skattafríar í Føroyum, men fult skattskyldugar í Danmark, hevur við sær, at fyritíðarpensjónistur, sum tekur pensjónina við sær til Danmarkar, fær væl minni útgoldið í Danmark enn í Føroyum av somu pensjón.

Tað er bert okkurt einstakt dømi um fyripensjónistar, sum flyta úr Føroyum til Danmark og taka pensjónina við sær.
Møguleiki er at fremja lógarbroyting, ið letur upp fyri serligari uttanlandsviðbót til hesar persónar, og verður mett um hetta í næstum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Sum greitt frá omanfyri, so verður grundupphæddin av fyritíðarpensjónini gjørd skattafrí.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Í § 29 í Skattalógini er ásett, hvørjar inntøkur ikki skulu roknast upp í skattskyldugu inntøkuna.

Í § 29, nr. 13, litra a er ásett, hvørjar veitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir (Løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a.) ikki skulu roknast sum skattskyldug inntøka.

Í uppskotinum verður grundupphæddin av fyritíðarpensjón sett inn í § 29, stk. 1, nr. 13 litra a í lógini. Hetta hevur við sær, at grundupphæddin av fyritíðarpensjón ikki longur skal roknast sum skattskyldug inntøka.

**Til § 1, nr. 2**
Við uppskotinum verður mælt til, at ásetingin verður broytt soleiðis, at munurin millum frádráttin og samanlagda lands- og kommuskatturin frameftir ikki fellur burtur, men verður goldin avvarðandi skattgjaldara.

Ásett verður, at munurin skal útgjaldast mánaðarliga. Hetta er fyri at tryggja, at tey, sum ikki brúka frádráttin fult út, skulu fáa gagn av frádráttinum leypandi, og ikki skulu bíða við at fáa hann útgoldnan árið eftir í sambandi við endaligu skattauppgerðina.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 26. september 2017

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Fylgiskjøl, sum ikki fáa lógargildi:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur